# Fýra í Klaksvík og 12 í Havn

**Formansskapurin í Løgtinginum fer í morgin at leggja fram fyri tingið uppskot um at Føroypar verða býttar í fimm valdømi, har eingin verður eykavaldur, og at Balinski útrokningarhátturin verður nýttur sum grundarlag fyri útrokningini**

VALDØMI
*Jan Müller*



*Valkvøldið í Norðurlandahúsinum 19. januar 2008. Í morgin er valskeiðið hálvrunnið - og nú er okkurt sum bendir á, at vit í seinasta lagi 19. januar í 2012 aftur sleppa at velja í fleiri valdømum*

Suðurstreymoy 12, Eysturoy 7, Vágar og Norðstreym 5, Suðuroy og Sandoy 5 og Norðoyggjar 4!

Tá ið formansskapurin í Løgtinginum á fundi við tingmenn fyrrapartin í morgin fer at umrøða spurningin, hvussu nógv valdømi Føroyar skulu skipast í, fer at verða spælt út við uppskoti, sum sigur, at talan skal verða um fimm valdømi og bara um valdømisvaldar tingmenn. Tingmannatalið í teimum fimm valdømunum skal verða, sum tað er nevnt omanfyri ella í alt 33.

Inntil á valinum í morgin fyri tveimum árum síðani var landið býtt sundur í sjey valdømi. Nú verður skotið upp, at talan skal verða um fimm valdømi. Umframt gamla Suðurstreymoyar valdømi verður Kollafjørður við í Suðurstreymi, sum harvið fer at fevna um alla Tórshavnar kommunu.

Gamla Norðstreymoyar valdømi – burtursæð frá Kollafirði – er ætlanin at leggja saman við Vága valdømi. Eysturoy verður eitt valdømi, Norðoyggjar vera eitt valdømi, og eitt valdømi verður sunnanfyri Skopunarfjørð. Talan verður altso um valdømi, sum fer at fevna um gomlu Suðuroyar og Sandoyar valdømi.

## Balinski drigin fram aftur

Eftir valið í 2004 varð nógv tosað um, at lutfallið í tingmannatalinum ikki samsvaraði við lutfallið í atkvøðutalinum. Endin á tí orðaskiftinum var, at tingið stutt undan valinum samtykti, at Føroyar skuldu skipast í eitt valdømi.

Tá varð sagt, at uppskotið um eitt valdømi ikki hevði fingið ta viðgerðina, sum eitt tílíkt mál átti at havt fingið. Men beinanvegin eftir løgtingsvalið í 2004 varð spurningurin um broytingar í vallógini ikki so lítið viðgjørdur.

Tá var tosað um Balinski útrokningarháttin. Hann er sokallað tvílutfalsligur deilaraháttur. Tað vil siga, at atlit bæði verða tikin fyri lutfallinum í samlaða atkvøðutalinum og lutfallinum millum valdømini, tá ið roknað verður út, hvussu tingið skal mannast.

Í hesum útrokningarháttinum verður ikki roknað við eykavaldum, men bara við valdømisvaldum. Merkisvert við hesum útrokningarháttinum er tað, at tað ikki er víst, at tann flokkurin, sum fær flestar atkvøður í einum valdømi, nýtist at fáa umboð í hesum valdinum. Tað var serliga hetta síðst nevnda, sum tingmenn og onnur høvdu ilt við at síggja tað skilagóða í, tá ið hesin útrokningarhátturin varð frammi í 2005.

Løgtingið hevur í hesum valskeiðnum samtykt uppskot til samtyktar, har tingið álegði landsstýriskvinnuni í innlendismálum at kanna, hvussu skipanin við einum valdømi hevur hilnast. Landsstýriskvinnan hevur seinni greitt tinginum frá, at hon ikki hevur pengar til at fremja hesa kanningina, og síðani hevur formansskapurin í tinginum gjørt av sjálvur at taka spurningin til viðgerðar.

Fyrrapartin týsdagin 19. januar fer formansskapurin at kunna tingið um hetta arbeiðið. Merkisvert er tað, at í morgin verður hetta valskeiðið hálvrunnið. Løgtingsval var 19. januar í 2008, og tað verður løgtingsval aftur í seinasta lagið 19. januar 2012.




**SAAB 9.5 2.0 TURBO** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JT 761 **Km:** 24.000
**Árgangur:** feb. 2008
**Útgjald:** 79.500 **Mðr. gjald:** 4.965 (5 ár)
**kr. 318.000,-**



**VW CADDY 2.0 SDI DIESEL** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UJ 435 **Km:** 45.000
**Árgangur:** apríl 2007
**Útgjald:** 32.000 **Mðr. gjald:** 2.033 (5 ár)
**kr. 128.000,-**



**PEUGEOT 307 1.6 STC,** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FP 505 **Km:** 44.000
**Árgangur:** okt. 2006
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.289 (5 ár)
**kr. 145.000,-**



**PEUGEOT 407 COUPÉ 3.0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BJ 455 **Km:** 42.000
**Árgangur:** juni 2006
**Útgjald:** 62.000 **Mðr. gjald:** 3.874 (5 ár)
**kr. 248.000,-**



**MAZDA PREMACY 1.8** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** RG 751 **Km:** 95.000
**Árgangur:** sept. 2004
**Útgjald:** 24.500 **Mðr. gjald:** 2.434 (3 ár)
**kr. 98.000,-**



**TOYOTA HILUX 4X2 2.5 TD** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SP 526 **Km:** 23.000
**Árgangur:** aug. 2007
**Útgjald:** 43.750 **Mðr. gjald:** 2.760 (5 ár)
**kr. 175.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 LUNA M/M** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GB 420 **Km:** 36.000
**Árgangur:** august 2006
**Útgjald:** 34.000 **Mðr. gjald:** 2.125 (5 ár)
**kr. 136.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL STC.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UB 637 **Km:** 46.000
**Árgangur:** aug. 2007
**Útgjald:** 59.500 **Mðr. gjald:** 3.720 (5 ár)
**kr. 238 .000,-**



**PEUGEOT 206 2.0 DIESEL VØRUV.**

**Skrásetingarnr:** JU 505 **Km:** 53.000
**Árgangur:** jan. 2004
**Útgjald:** 22.000 **Mðr. gjald:** 2.179 (3 ár)
**kr. 74.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TE 275 **Km:** 31.000
**Árgangur:** feb. 2003
**Útgjald:** 31.250 **Mðr. gjald:** 3.080 (3 ár)
**kr. 125.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastuefttirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo